

*Smáar myndir hjá Kristin í Geil hanga í mongum føroyskum heimum. Myndin Tindhólmur er frá 1920 og hongur í Listaskálanum*



*Tann ovurstóra myndin "Ein donsk strond" frá 1842 hjá J.Th. Lundby*



*Niels Kruse luttók í Várframsýningini í Charlottenborg so tíðliga sum í 1924. Henda myndin: Bátur undir segli er frá 1930*



*J.C.Dahl: Vetrarlandslag við steinaldargrøv, 1838*

Kielerfriðin í 1814, tá Norra glapp Danmark av hondum. Tað vil so vera, at tað er undir trýsti og kreppu, at tørvurin at savnast um traditiónina sprettur av álvara. So er spurningurin hvat tað er fyri trýst ella kreppu, nýggja samgongan heldur okkum vera í. Samgonguskjalið kemur undir evninum mentan inn á fleiri áhugaverd mál sum t.d. menning av musikkskúlaskipanini, endurnýggjan av sendineti kringvarpsins, bygging av tjóðleikahúsi, skipan av týðaragrunni og ikki minst staðfesting av, at ein ávísur partur av útreiðslunum til almenna og kommunala bygging skal markast til list. Frálíkt hugskot! Í eini progressivari og modernaðari menning av føroyskum mentanarlívi í okkara globaliseraða heimi eru hetta skilagóð lutmál, sum tó ikki samsvara serliga væl við tann heimsavnoktandi og klaustrofobiskt defensiva tónan, ið valdar nakrar reglur longur uppi í samgonguskjalinum: “Tjóðarsamleikin er tað, sum knýtir føroyska fólkið saman. Orsøkin til at vit byggja land er, at vit hava ein serstakan samleika. Men hann er undir trýsti uttaneftir. Tí verða munandi átøk gjørd til tess at stimbra og menna tjóðarsamleikan”. Um hesar orðingar hava nakað at siga, fara vit skjótt at síggja dømi uppá hvussu innantómur og stirðnaður tjóðskaparromantikkur tekur seg út, tá hann er tvungin ella úrslit av sensuri.

## Realistiska nýbrotið

Aftaná nokkso nógv ljósareyð sólsetur kennast myndirnar hjá Købke vælgerandi í teirra neyva hóvsemi. Tað sæst á mátanum, sum Lundby hevur málað bláa himmalin í stóru myndini, at hann hevur roynt at vera so trúgvur móti sínum myndevni sum møguligt. Allíkavæl er stórur munur millum hansara idealistisku hugsjónir við søguligum og sagnarligum tilsipingum og so endamálið hjá naturalistisku listafólkunum, sum avmarkaði seg fult og heilt til ítøkiliga veruleikan. Naturalistiski og seinni impressionistiski íblásturin kom úr Fraklandi og franska árinið merkist týðiligt í myndunum á framsýningini, sum eru frá umleið 1870. Hesa tíðina gjørdist Paris listarligur miðdepil í Europa, sum eisini tey norðurlendsku listafólkini vitjaðu, t.d. Theodor Philipsen (1840-1920), hvørs ljós- og litríku myndir eisini kunnu upplivast á framsýningini.

## Hugans landslag

Nýbrotið var startskotið til eina tíð, tá rák og mótrák tóku at avloysa hvørt annað við lutfalsliga stuttum millumbilum. Danski yrkjarin Sophus Claussen skrivaði í 1894 eina kjaklynta yrking til Georg Brandes, sum snýr seg um júst hetta: “De satte Forsken op mod Drømmespind, vor Nutid sætter nye Drømme ind. Hvad forskel? Det er samme Fægteskole: Hæve Problemerne til ny Debat, guddomsbesjæle, hvad der var forladt, og siden hen... paa Vaabenlykken stole.”. Yrkjarar og myndlistafólk í 1890´unum vóru ikki longur nøgd við at avmarka seg til tað ítøkiliga, tey vildu heldur dyrka dreymar og hugflog og hetta er kanska tann allarmest hugtakandi parturin av framsýningini. Her eru myndir hjá Edvardi Munch, Akseli Gallen-Kallela, Vilhelm Hammershøi og her hongur hypnotiserandi myndin “Skýggið” frá 1896 hjá svenska Prins Eugen (1865-1947), sum gjørdist listamaður, tó at kongliga bakgrund hansara als ikki legði upp til slíkt lívsstarv. Skýggið sær út at vera ein veruleikakent snapshot úr svensku náttúruni ein vanligan, frískan og ljósan dag. Men hon rúnarbindur áskoðaran, fær hon ein kjans. Hetta er ikki nakað ávíst stað í Svøríki, ið verður lýst, myndevnið stavar úr hugaheimi málarans. Litirnir eru ov lýsandi til at vera veruleikalíkir og málihátturin er slættur, eins og allir formar tykjast einfaldaðir so mikið, at alt einstaklingaárin hvørvur, meðan tað umboðandi, symbolistiska árinið vaksur. Gøtan, sum gongur úr forgrundini á myndini og aftur um sýn gerst symbol fyri okkara lívsleið, sum vit ikki kenna fyrr enn hon er gingin. Træið og skýggið verða mótsett hvørjum øðrum, sum saman við gøtuni og sermerkta máliháttinum fáa ein at hugsa um longsil eftir tí, sum er hinumegin deyðan ella himmalin. Á sama hátt sum í eldru myndum William Heinesens (1900-1991), tykist náttúran onkursvegna íbygd og full av mystiskum varhuga. Í hesum sambandi er vert at nevna ein annan áhugaverdan listamann, ið er við á framsýningini í Statens Museum for Kunst og tað er íslendski vegarin, listamaðurin Þórarinn B. Þorláksson (1867-1924), sum í 1900 hevði ta fyrstu íslendsku listaframsýningina í Reykjavík og sum ivaleyst hevur verið ein stór inspiratión hjá Williami Heinesen.

## Høvuðsverk

Tað er lætt at skilja, at núverandi framsýningin í Statens Museum for Kunst er væl umtókt. Hetta hongur saman við góðskuni bæði á listini og á listaformidlingini. Hetta eru høvuðsverk í norðurlendskari listasøgu, ið eisini verða viðgjørd við hóskandi tign. Kanska hevur tað eisini týdning, at vøkur landslagslist, gullrammur og søguligt tilvit hóska væl til traditiónsfegna rákið í løtuni. Óansæð kann tað viðmælast øllum, sum kunnu, at fara at hyggja at framsýningini, sum letur aftur 24.februar 2008. Um hugurin er betur til nýggjari landslagslist, so er møguleikin beint nú at uppliva bæði føroyska og íslendska úrmælingalist í ávikavíst Listahøllini í Skipasmiðjuni í Havn (Bárður Jákupsson) og Listaskálanum (Jóhannes S. Kjarval).